# Frisørsalongin gjørdist teirra egningaskúrur

**- Allir bátarnir, sum vit hava havt, hava kallast Henny eftir mær. Eg segði í sínari tíð, at mær hevði dámað betur, at bátarnir bóru okkurt av staðarnøvnunum á Eiði, haðani eg eri ættað, men maðurin hevur hildið upp á mítt navn, sigur Henny Olsen, kona Óla Karl Olsen, útróðrarmann**

## Umborð



**Vilmund Jacobsen**
blaðmaður
vilmund@sosialurin.fo

Á Biskupsstøðgøtu 6 í Klaksvík standa maður og kona í kjallaranum og egna til næstu setu. Tað eru hjúnini, Henny og Óli Karl Olsen, sum hevur verið útróðrarmaður burtur av síðan tíðliga í nítiárunum.

Øll árini hava tey bæði verið saman um útróðurin. Hon hevur hjálpt manninum við egningini, og hann hevur hjálpt henni heima við hús, tá øll línan er egnd og ikki er loysandi fyri veður.

Gágguna, sum tey serliga egna um veturin fyri at fáa meira av fiski við toskaskræðu, sum eisini gevur betri prís, fiskar Óli Karl sjálvur. Hetta ger hann, tá ikki er farandi til útróðrar.

Óli Karl er altíð einsamallur á báti.

Tá Sosialurin í gjár setti seg í samband við hjúnini, var tað Henny, sum tók telefonina.

- Maðurin var á útróðri í gjár og fyrradagin, men hesir túrarnir royndust einki serligt. Annan dagin fekk hann 700 pund á 11 línum og hin 540 pund á 10 línum. Veiðan var at kalla bara hýsa. Onkur hendinga toskur var uppi í.

Henny sigur, at fiskiskapurin hjá útróðrarbátunum er slakur í løtuni, og hetta hevur eisini verið vánalig tíð, til hýsan tekur seg nærri landi aftur.

- Ein dagur, sum gevur 50 pund á stampin, er brúkiligur hesa tíðina av árinum, tá tú egnir línuna sjálv/ur, og maðurin veiðir meginpartin av agninum sjálvur, leggur hon aftrat.

Útróðrarbáturin hjá Óla Karl, sum ber navnið á konuni – Henny - ein 32 fót scaniaplast, bygdur í Esbjerg.

- Allir bátarnir, sum vit hava havt, hava kallast Henny. Eg segði í sínari tíð, at mær hevði dámað betur, at bátarnir bóru okkurt av staðarnøvnunum á Eiði, haðani eg eri ættað, men maðurin hevur hildið upp á mítt navn, sigur hon brosandi.

Henny er annars útbúgvin hárfrýðkanarkvinna, og tá tey bygdu sær húsini á Biskupsstøðgøtu í Klaksvík í 1982, var ætlanin, at í hølini í kjallaranum, har tey bæði standa og egna, skuldu vera hárfrýðkanarstova.

- So, vit kunnu siga, at ætlaða hárfrýðkanarstovan gjørdist okkara egningarskúrur, sigur hon.

Longu áðrenn Óli Karl fór undir útróður burtur av tíðliga í nítiárunum, hevði hann bát, og soleiðis hevur hesin parturin av kjallaranum verið teirra egningarskúrur heilt síðan einaferð í áttatiárunum.

Óli Karl, sum nú kemur í telefonina, sigur, at hann fyrst hevði eitt 10-mannafar, og síðan keypti hann sær ein 26 fót stóran grimsøy-bát, sum Brøður Petersen í Fuglafirði umboðaðu. Tað var í 1995, at hann keypti 32 fót stóra scania-bátin, sum er bygdur í Esbjerg, og hendan bátin hevur hann framvegis.

- Tey fyrstu árini eftir 1985 róði eg bara út í frítíðini og í vikuskiftinum, og soleiðis var heilt fram til fyrst í nítiárunum, tá eg gavst at arbeiða uppi á landi og burtur av legði meg eftir at rógva út.

Hann minnist aftur á vánaligu fiskiárini tíðliga í nítiárunum, sum royndust illa. Men, sum árini gingu, kom fiskurin aftur, og eftir miðskeiðis í nítiárunum var góður útróður.

- Síðan hevur útróðurin verið hampiligur og hampiliga góður summi ár, til fiskiskapurin nú aftur er minkaður seinastu árini. Fiskifrøðingar siga, at toskurin er so illa fyri. Tað er hann kanska, men nú samlaða toskaveiðan nærkast tí minimala, er líkt til, at toskurin mennist aftur. Í løtuni stúri eg meira fyri hýsuni enn toskinum, sigur útróðrarmaðurin.

Óli Karl og Henny hava verið



*Útróður hevur verið teirra livibreyð burtur av síðan tíðliga í nítiárunum. – Hetta hevði slett ikki borið til, um vit bæði ikki vóru saman um arbeiði, sigur Óli Karl Olsen, sum hevur konu sína Henny við sína lið*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

gift í 27 ár. Tey eiga tvær gentur og tveir dreingir. Børnini hava ikki somu áhugamál sum foreldrini og hava tískil heldur ikki luttikið í egning og útróðri.

- Tað ger einki, um áhugamálini ikki eru tey somu, men børnini hava so ongantíð skammast yvir, at vit bæði hava fingist við egning í kjallaranum og útróður, sigur Henny.

Hóast hjúnini hava fingist við egning og útróður burtur av síðan tíðliga í nítiárunum, veit Óli Karl eisini, hvat tað er at arbeiða í fiskivinnuni á landi.

Tá eg fór úr 9. flokki í 1970 – ella 1971 – fór eg at arbeiða á Dávavirkinum. Frammanundan hevði eg verið við til at landað onkran av Seglhúsbátunum í frítíðini, eins og mær dámdi væl at vera á báti saman við pápa mínum, sum altíð hevði bát.

Eftir at hava arbeitt eitt skifti á Dávavirkinum, fór Óli Karl at arbeiða á Kósini, har John Høj tá var stjóri.

- Eg og sonur John, Jógvan Høj, vóru vinmenn, og tá ið Jógvan í 1973 fór yvir til Stavanger á hermetik-skúla, fór eg við. Skúlin, sum serliga fevndi um teori og praksis í sambandi við ymiskan blikkamat, vardi í eitt ár. Vit høvdu nógv at gera á skúlanum, men komu báðir heimaftur við rímiliga góðum prógvi í 1974.

Óli Karl sigur, at John Høj hevði sjálvur verið á hesum skúla í Noregi í 1965.

Heimaftur komin fór Óli Karl aftur á Kósina eitt skifti, og haðani á Føroya Fiskasølu, har hann ferðaðist kring landið saman við eitt nú Egili Toftegaard at hava eftirlit við, hvussu serliga flak og saltfiskur var til dygdar á føroysku fiskavikjunum.

- Meðan eg arbeiddi hjá Føroya Fiskasølu, bleiv eg spurdur, um eg vildi fara til Grønlands at hava eftirlit við rækjum, men tá takkaði eg nei og gavst á Fiskasøluni.

Nú bar leiðin aftur á Kósina, har Óli Karl gjørdist arbeiðsformaður saman við Óla Volles í fleiri ár.

At enda eru vit komin til tíðina tíðliga í nítiárunum, tá hann sigur seg úr starvi á Kósini og burtur av leggur seg eftir at rógva út – við konu síni í »skúrinum«.

- Flestu árini havi eg róð við línu. Okkurt árið royndi eg við snellu, men seinastu fimm árini havi eg ikki nortið snelluna. Aftrat okkum báður – mær og konuni – hava vit ein pensjónist, sum plagar at taka eina hond í við egningini. Annars hava eg og Henny verið einsamøll um hetta virksemið, sum hevur verið okkara livibreyð øll hesi árini, sigur Óli Karl.

Hann dylir ikki, at soleiðis, sum gongdin hevur verið við útróðri, har fiskiskapurin hevur verið skiftandi, hevði hetta slett ikki borið til, um tey bæði ikki vóru saman um uppgávuna.

- Eg havi mangan hugsað um at givist við útróðrinum, og tað geri eg eisini nú, men nú fáa vit at síggja, um nøkur hýsa verður at fáa, tá summarið kemur, sigur Óli Karl Olsen, útróðrarmaður.